

# Modernað 60'ara hús í Gundadali

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndatøka: Jens Kristian Vang*

Uppi í veðurgóða Gundadali, beint út til stadion, búgva Sigrun Danielsen og Regin Jakobsen, saman við tveimum stórum døtrum og fitta chihuahua hundinum Stellu. Húsini eru eini púra vanlig 60'ara hús, lík teimum, flestu føroyingar búgva í. Hetta er eisini orsøkin til, at vit hava valt júst hesi húsini: fyri at vísa, hvussu hugnalig, nútíðarhóskandi og brúkaravinarlig eini slík hús kunnu vera. Stílurin hjá Sigrun og Regin er bæði persónligur, praktiskur og hugnaligur, við nógvum góðum og inspirerandi hugskotum og loysnum. Saman við kreativum loysnum, dámar teimum væl klassiskar danskar designmøblar og góða føroyska list



*60'ara-sethúsini hjá Sigrun Danielsen og Regin Jakobsen eru sjeinað upp. Millum annað við einari stórari terassu út frá køkinum, sum er sum eitt eyka rúm um summarið. Í kjallaranum hevur Sigrun privata klinikk við fysioterapi*



*Oranguplantan saman við málningum eftir Øssur Mohr*



*Regin hevur sjálvur gjørt hvítu oynna, sum býtir køk og stovu sundur. Hann hevur brúkt tvey vanlig køkselement, sett síður á, hillar ímillum, borðplátu omaná og málað hvítt. Oyggin stendur á hjólum, so hon kann flytast*



*Ein vakur gluggi út í gongina*



*Úti í gongini er eitt lítið vindeyga, sum bæði pyntar og gevur ljós. Gamli radiatorurin er bygdur inn í ein fiksan radiatorskjulara*



*Kaffi ella espresso – tú velur sjálv*